


# Fyrsta frálandaskipið til Íslands

Jan Müller

11.03.2014 - 20:20

Oljan.fo

Íslendingar tóku enn eitt stig inn í olju- og frá1andavinnuna nú um dagarnar, tá tað fyrsta frálandaskipið til Íslands fór bakkastokki á Cemre Shipyard-skipasmiðjuni í Turkalandi.

Skipið, sum verður bygt til reiðaríið Fafnir Offshore, hevur fingið navnið Polarsyssel.

Polarsyssel er 88,5 metrar langt, 17,6 merar breitt, og manningarrrúm eru til 30 fólk. Dekkið er 850 fermetrar stórt, og skipið hevur tyrlupláss. Skipið er útgjørt við sløkkiútgerð, útgerð til at basa oljudálking, og harumframt hevur tað serliga útgerð, sum ger tað møguligt hjá manningini at síggja fólk, olju og ís á sjónum í myrkri.

Skipið hevur tríggjar arbeiðs- og bjargingarbátar.

Avtalað er, at Polarsyssel skal hava støð við Spitsbergen helvtina av árinum, har skipið skal veita Svalbard-økinum neyðugar tænastur saman við tveimum tyrlum. Herumframt skal skipið virka sum eftirlits-, umhvørvis- og bjargingarskip við Svalbard, Hopen og Bjarnoynna.